## Frá hitmakara til løgmann

Eysturríkska blaðið, Nachrichten, hevði í gjár stóra grein um føroysku hetjurnar, sum spældu í Landskrona fyri 18 árum síðani. Ta ferðina varð nógv gjørt burturúr, at talan var um spælarar, sum høvdu sítt púrasta vanliga arbeiði við síðuna av. Og hesa ferð varð so yvirlit yvir, hvar føroysku spælararnir eru í dag. Ikki minst hava teir bitið merkið í, at eykamálverjin ta ferðina nú er vorðin ”premierminister” í Føroyum. Og eisini hava tey bitið merki í, at Jóannes Jakobsen millum fleiri av ítrivum sínum eisini hevur staðið fyri eini tí mest seldu fløguútgávuni seinnu árini. Nevnliga fløguni við M´as Blues Band. Meðan nógv verður gjørt burtur úr føroysku spælarunum, fáa eysturríksku spælararnir frá 1990 ein lítlan kassa á síðuni, har sagt verður frá, hvar hesir eru í dag. Ein teirra er so eisini í Føroyum. Nevnliga Andreas Herzog, sum í dag er sonevndur team-manager hjá landsliðnum.


Färöers Helden heute – von der Hitparade zum Premierminister

## Lendu í gjár

Landsliðshópurin hjá Eysturríki kom á Hotel Føroyar um 20’tíðina í gjárkvøldið. Veðurlíkindini vóru ikki av teimum bestu, men í gjárkvøldið batnaði munandi, og øll flogferðsla í Vágum gekk eftir vild. Eysturríkski hópurin var komin við flogfari beinleiðis úr Wien, og í dag fara teir so undir føroyska partin av sínum venjingum.

# Jákup fer upp á 60’ara kontina

**Leikluturin hjá 38 ára gamla málverjanum og liðformanninum á landsliðnum er staðilig undirstriking av, at tolin trívst**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá ið føroyska landsliðið seinnapartin í morgin fer at ganga inn á vøllin, verður tað við málverjanum Jákupi Mikkelsen á odda. Síðani Óli Johannesen gavst á landsliðnum í juni í fjør, hevur Jákup verið liðformaður.

At Jógvan Martin Olsen valdi málverjan til liðformann var heilt upplagt. Jákup hevur longri enn nakar av hinum verið partur av landsliðnum, og hann hevur í allar mátar royndirnar og persónligu eginleikarnar, sum gera, at hann er upplagt val til álitissessin.

Eingin, sum kennir fryntliga og lítillætna málverjan, fer at skriva undir uppá, at hann hevur ælbogað seg fram. Tað liggur ikki til hansara. At hann nú er sjálvskrivaður oddviti er undirstriking av fínum menniskjaligum og fótbóltsligum dygdum og staðfesting av, at tolin trívst


*Gott málmansspæl hevur ofta verið fortreytin fyri góðum føroyskum úrslitum. Og Jákup Mikkelsen hevur mest sum altíð leverað vøruna, tá fótbóltslandsliðið hevur verið á vøllinum*

### Nummar fýra á listanum

Í morgin fer Jákup Mikkelsen at verja føroyska málið fyri 60. ferð. Bara tríggir spælarar hava áður spælt so ofta á landsliðnum. Óli Johannesen eigur metið við 82 dystum. Jens Martin Knudsen hevur spælt 65 landsdystir, og Julian S. Johnsson hevur umboðað Føroyar 62 ferðir.

Tað eru meiri enn 20 ár síðani, at Jákup Mikkelsen fyrstu ferð var í landsliðsferðalagnum. Jákup er føddur 14. august í 1970, og hann var tískil júst fyltur 18, tá ið hann í fyrsta altjóða skrásetta landsdystinum hjá Føroyum – á útivølli ímóti Íslandi 24. august 1988 – var eykamaður hjá Jens Martini Knudsen.

Frá tí at Jákup var fyrstu ferð á beinkinum, og inntil hann fyrstu ferð vardi landsliðsmálið, gingu tað sjey ár. 2. juli í 1995 spældu Føroyar vinardyst í Íslandi (0-2), og tá var Jákup málverji. Nøgvu tey fyrstu árini var Kaj Leo Johannesen, núverandi løgmaður, eykamaður hjá Jens Martini, og Kaj Leo vardi føroyska málið fýra ferðir. Jákup var aðru ferð á beinkinum 16. oktober í 1991, tá ið Føroyar taptu 2-0 í Landskrona ímóti Jugoslavia, og hann sat tólv ferðir á beinkinum, áðrenn hann í 1995 fekk høvi at vísa síni kynstur á landsliðnum.

Næstu árini styrkti Jákup støðugt um sína støðu í kappingini við Jens Martin Knudsen. Einar 25 ferðir í alt hevur Jákup trúgvur sitið á beinkinum, men nógvu tey seinastu árini hevur eingin ivi verið um, at fyrrverandi DM vinnarin við Herfølge er stinnasti føroyski málverjin. Tí verjir hann málið fyri 60. ferð í morgin.

Í teimum 59 landsdystunum, sum Jákup Mikkelsen hevur spælt, hevur hann 137 ferðir verið noyddur at fara í meskarnar eftir bóltinum. Men kortini hevur hann ofta verið roknaður at vera tann, sum hevur staðið seg best. Útlendskir landsliðsvenjarar hava fleiri ferðir havt á orði, hvussu góðan málverja føroyska liðið hevur havt.

### Avrikini

Jákup hevur staðið seg framúr væl, tá ið Føroyar hava spælt ímóti eitt nú Týsklandi, Fraklandi og Italia. Størsta trýstið hevur ofta verið, tá ið mótstøðuliðið hevur verið úr Eystureuropa. Eitt tað besta avrikið yvirhøvur hjá málverjanum mundi tað vera, tá ið Føroyar 10. oktober 1998 megnaðu málleysan javnleik í Vilnius ímóti Litava. Serliga fyrsta hálva tíman, sum hyggjararnir heima í Føroyum tíverri ikki sóu orsaka av tekniskum breki, vísti málverjin framúr avrik. Ta ferðina var talan um sera minnisríka landsliðsferð, tí fýra dagar eftir javnleikin í Vilnius taptu Føroyar heilt tepurt 2-1 ímóti Skotlandi í Aberdeen, og aftur ta ferðina var málverjin sannur brandur.

Tað vóru avrik av hesum kalibrinum, sum tvey ár seinni vóru høvuðsorsøkin til, at Herfølge gjørdist danskur meistari, og síðani hevur Jákup verið fremsta orsøkin til, at B36 í 2005 gjørdist meistari. Eitt avrik, sum eisini bar við sær, at sum fyrsti málverjin yvir høvur kundi rópa seg ársins spælara.

## Mugu vera 100%

**Hóast úrslitið í Landskrona fyri 18 árum síðani enn stendur sum ævig áminning, so er hetta ikki eitt úrslit, sum føroyska landsliðið fær brúkt til so øgiliga nógv, heldur Atli Danielsen**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

3-2 hjá Sjónvarpinum var sjálvandi partur av kvøldarundirhaldinum hjá føroyska fótbóltslandsliðnum, sum nú er farið mest sum í isolatión fram til dystin leygardagin.

Eftir at hava sæð brotini frá 1990 spurdu vit Atla Danielsen, hvat tað hevur at siga fyri landsliðið í dag, at tað er júst Eysturríki, sum er mótstøðuliðið leygardagin.

- Tað hevur verið øgiligt uppmerksemi kring hendan dystin, og sjálvandi ynskja vit at endurtaka tað úrslitið, sum Føroyar fingu ta ferðina.

- Men akkurát tað úrslitið fáa vit ikki brúkt til so nógv. Vit eru noyddir at fara á vøllin og levera eitt 100% arbeiði, og so mugu vit vita, hvussu tað røkkur.

Bæði í blaðnum her í dag og í 3-2 í gjár segði Jóannes Jakobsen, at alt tosið um avrikið ta ferðina eigur at at motivera dagsins spælarar til at prógva, at teir eru minst líka góðir. Er tað nakað, sum tit fáa brúkt tann vegin.

- Ja, tað kann tað, men hinvegin er aftur galdandi, at vit fáa ikki brúkt tað til so øgiliga nógv. Eg skal ikki siga, at tað leggur eyka trýst á okkum, men vit vilja sjálvandi eisini vísa, at vit duga.

Tað vakti sjálvandi kenslur her heima, tá Eysturríki kom úr pottinum. Men minnist tú yvir høvur tann dystin?

- Eg minnist ikki nógv. Eg var sjey ára gamal, og øll heima hjá okkum hugdu sjálvandi eftir dystinum. Tað, sum stendur sterkast í minninum er, at pápi mín gjørdist somikið glaður, tá Føroyar skoraðu. Hann lyfti meg upp, og úrslitið varð, at eg smekkaði høvdið í eina lampu.


*Lampan heima í stovuni fekk ein túr, tá Torkil skoraði í 1990. Nú hevur Atli Danielsen møguleika at skapa somu gleði. Bæði heima hjá pápanum og hjá landinum annars*
*Mynd: Álvur Haraldsen*